# Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 10.03.2020
Mál nr.: 0626-091/19
Málsviðgjørt: KTH

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1** |
| Løgtingslóg um vápn v.m. | Løgtingslóg um vápn o.a. |
| **§ 1.** [...]<br>*Stk. 3.* Tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella evna til amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2. [...] | **§ 1.** [...]<br>*Stk. 3.* Tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella flyta út amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2. [...] |
| **§ 2.** Undantikin frá forboðnum í § 1 eru:<br>[...] | **§ 2.** Undantikin frá forboðnum í § 1, stk. 1 eru:<br>[...] |
| **§ 3 a.** Tað er forboðið persónum, ið ikki hava vápnaprógv, at flyta inn, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1. | **§ 3 a.** Tað er forboðið persónum, ið ikki hava vápnaprógv, at flyta inn, flyta út, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1. |
| **§ 4.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um fráboðan og skráseting av teimum lutum og tilfari, sum koma undir §§ 1 og 2. | **§ 4.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um loyvi, fráboðan og skráseting av teimum lutum og tilfari, sum koma undir §§ 1 og 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar, sum eru skrásettir sambært 1. pkt. |
| | **§ 2** |
| | Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kungjørd. |